# BÓKASÍÐAN

bøkur, bøkur, bøkur…



*Ritstjórn: Anna V. Ellingsgaard*
*anna@sosialurin.fo*

## Metseljarar í Bókasøluni í 2005

Bókasølan í SMS gjørdi herfyri upp, hvørjar bøkur vóru tær mest seldu í 2005, og sær endaliga úrslitið soleiðis út:

**Mest seldar føroyskar bøkur – Vaksin**

1. Krossmessa
2. Glansbílætasamlararnir
3. Dávur í Tjørnuvík
4. Søren Kierkegaard. Antin ella.
5. Við úthavsins strendur 2
6. Teir tóku kjansin
7. Navnabókin
8. Kaj 2
9. Ó – søgur um djevilskap
10. Merkið

**Mest seldar føroyskar bøkur – Børn**

1. Harry Potter og Hálvblóðsprinsurin
2. Vinir mínir
3. Flekk spælir
4. Flekk á bóndagarðinum
5. Rok í veltuni
6. Ein hundur, ein ketta og ein mús
7. Ringanna Harri III – Kongurin kemur aftur
8. Tá eg var sjórænari
9. Ævintýr

**Mest seldar danskar bøkur:**

1. Su doku
2. Da Vinci Mysteriet
3. Hvorfor mænd ikke hører efter og kvinder ikke kan
4. Harry Potter og halvblodsprinsen
5. Den lille bog om katte
6. Engle og dæmoner
7. Slave
8. Sjove sjaler
9. Da Vinci Mysteriet Illustreret
10. De uanstændige

**Mest seldar enskar bøkur:**

1. Angels and Demons
2. Harry Potter and the Half-blood Prince
3. Digital Fortress
4. Deception Points
5. Erotica Universalis
6. The Da Vinci Code
7. Pompeii
8. Oxford Advanced Learners' Dictionary
9. The Hitchhiker's Guide to the Galaxy
10. Bono on Bono

# Óndskapaninar filosofi

Kendi norski professarin í heimspeki, Arne Johan Vetlesen, hevur meir at kalla gjørt tað til sítt serøki at skriva bøkur um alment menniskjalig evni út frá einum filosofiskum sjónarhorni.

Herfyri gav hann út bókina *Evil and Human Agency*, har hann við støði í jødatýningini undir 2. heimsbardaga og etnisku útreinsingini í Bosnien gevur sítt boð uppá, hvussu vit kunnu royna at fata kollektivar óndar gerðir.

**Vandamikla samansetingin**

Vetlesen skilir óndskap sum "Við vilja at valda einum øðrum menniskja pínu og líðing ímóti hansara ella hennara vilja og harvið verða orsøk til álvarsaman og ætlaðan skaða". Vetlesen tekur sostatt ikki undir við sjónarmiðnum, sum ofta er frammi, at óndskapur í sær sjálvum ikki er til, men er úrslit av skaðiligum sosialum umstøðum. Sambært Vetlesen, er óndskapur tengdur at valinum og ábyrgdini hjá tí einstaka, meðan mest vandamikla samansetingin hendir, tá einstaklingar og heilir bólkar finna ein felags áhuga í at fremja tað skaðiliga. Tá kann úrslitið gerast ein vanlukka, eins og tað hendi í Bosinen, tá menniskju framdu størstu illgerðirnar móti mannættini síðani 2. heimsbardaga.

Í bókini vísir Vetlesen á, at her, sum so ofta fyrr, vísti tað seg, at ein triði partur var við, sum var samsekur við ikki at gera nakað fyri at forða illgerðunum. Í hesum sambandi setir Vetlesen sær fyri at kanna, hvussu altjóða samfelagið kundi svíkja so dyggiliga, at tað førdi eitt heilt land í avgrundina, og hvussu slíkt kann forðast. Tað vóru nevniliga ikki óndar ætlanir hjá altjóða samfelagnum, sum førdu til vanlukkuna, men heldur tað, sum ikki varð gjørt, sigur Vetlesen.



*Norski heimspekingurin og høvundurin Arne Johan Vetlesen ivast ikki í, at fyrilagaður óndskapur er til og ofta er verst millum menniskju, sum kenna hvørt annað*

**Nærleiki ongin forðan**

Í fleiri førum mótprógva kanningarnar hjá Vetlesen páhaldið um, at óndskapur verður mest effektivur, um ein ávís sálarlig frástøða er millum offur og bøðil. Hetta verður annars hildið at hava verið mátin, sum Heinrich Himmler nýtti, fyri at gera týningina av jøðum so effektiva, sum gjørligt. Í bókini vísir Vetlesen á, at í týningarlegunum í Bosnien og Rwanda vóru offur og bøðil ofta nær í ætt við hvønn annan ella gamlir skúlafelagar, og at júst hesin nærleikin ofta var við til at herða píningina.

Vetlesen er ein av virknastu norsku heimspekingunum og er ein av mest brúktu fyrilestrahaldarnum á heilsustovnum. Hann hevur fyri tað mesta arbeitt við evnum innan etik og sosialfilosofi og millum bøkurnar hann hevur skrivað kunnu nevnast *Følelser og moral*, *Moralens sjanser i markedets tidsalder* og *Smerte*. *Evil and the Human Agency* er útgivin á universitetsforlagnum í Cambridge.

Bókanýtt:

## Enn ein donsk frumútgáva av Auster

Fyri fjóðru ferð á rað verður ein bók eftir amerikanska høvundan Paul Auster nú frumútgivin á donskum. Avtalan millum danska forlagið Kofoed og væl umtókta høvundan er úrslit av áralanga vinarlagnum millum stjóran á forlagnum Per Kofoed og Paul Auster. Per Kofoed er í løtuni í ferð við at lesa handritið, ið hevur enska heitið *Travels in the scriptorium*, og kann avdúka, at fleiri av persónunum í øðrum bókum eftir Auster ganga aftur nýggju bókini. *Travels in the Scriptorium* fær danska heitið *Rejser i skrivestuen* og kemur út 1. juni



*Paul Auster*

## Samiska bygdin á eggini

Jovnna Ánde Vest, Árbbola – at III
Týdd: Arvingerne III,
Samisk Forfatterlag, SGS, 2005

Samiska uppskotið til Norðurlanda Bókmentavirðislønina 2006, *Arvingerne* eftir Jovnna Ánde Vest, man uttan iva geva afturljóð í huganum hjá nógvum føroyingum í lýsingini av einum lítlum bygdasamfelag á eggini til modernaðar tíðir ella bygdadeyðan.

Í lítlu bygdini Mattesby koma og fara árstíðirnar, bóndin sáar og heystar, traktorurin verður í ólagi og má gerast aftur og alt gongur sína vanligu gongd. Onki tykist at gerast betri hendan veturin, har minkandi talið av íbúgvum stríðist við at halda lív í bygdini. Tunglyndi ger vart við seg hjá onkrum, meðan ein annar má fáa fyritíðarpensón, tí kroppurin ikki orkar longur.

Ein glotti er at hóma, tá eitt ungt par, sum upprunaliga er úr bygdini, velur at búseta seg har aftur. Mestur kenna tey seg noydd til tað, tí hini í bygdini síggja tey sum arvingar til siðbundna lívið og bygdina sjálva. Eisini máttu tey ásanna, at teirra samiski uppruni ikki júst var rætta atgongumerkið til nakað í Svøríki, har tey royndu eydnuna. Við teimum hendir okkurt nýtt, men ongin torir rættiliga at taka stigið inn í modernaðar tíðir, sum tey ræðast verður stigið út av eggini. Spennandi verður at síggja, hvussu tað fer at gangast hesi poetisku og blídliga speiksu søguni um tey stillu lívini, tá virðislønin verður handað næsta fríggjadag.



*Jovnna Ánde Vest*

**Stórar, tjúkkar, tunnar, smáar, langar…**
Á Føroyaprent eru allar bøkur vælkomnar
Vit hava drúgvastu royndirnar innan bókaprent

FØROYAPRENT
Hoyvíksvegur 59 | 110 Tórshavn | Tel. 314 555 | www.foroyaprent.fo